# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019

## SPURDÓMUR: HVÍ ER TAÐ SUMMI BØRN, SUM IKKI VAKSA?




Granskarar: 5. flokkur í Sands skúla

# INNGANGUR

Vit eru áhuga í, hví at summi børn steðga við at vaksa og noyðast at sproyta seg við heilivági. So fyrst hava vit gjørt spurningar til Jeaneth Løkja, sum er komunulækni og spurdu hana um hon visti nakað um tað. Síðani sendu vit ein e-post til barnadeildina og bíðaðu so eftur svari í nakrir dagar, og tað kom at enda fram. Og so hava vit eisini fingið samrøðu við Elsu Vest heilsufrøing hon gav okkum nógv gott at vita. So hava vit eisini spurt mammu Kjartan, sum gongur í okkara flokki, nakrar spurningar, tí at Kjartan hevur eina sjúku og má sproyta seg hvønn dag og tað hildu vit vera nokkso áhugavert, og alt hetta hava vit brúkt til tað vit eru komin fram til. Vit vita væl at Kjartan sproytar seg hvønn dag, og at tað hevur nakað at gera við at hann ikki veksur eins og onnur børn, men vit ynsktu at vita meir um hetta, og tað er tí vit fóru at granska í tí.

Lærari:

Frígðgerð Selfoss, fs0904g8@skulin.fo

Luttakarar: Rúna, Martin, Kjartan, Brandur, Andrea, Ata, Sissal, Vár, Sandra, Elsi, Demmus Rói og Jákup Andrias

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

Hypotesur

3. Legg eina ætlan

4. Savna upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

1. Spurningar til barnadeildina á LS
2. Svar frá Rúnu Olsen barnalækna
3. Spurningar til Elsu Vest heilsufrøðingi við svari
4. Spurningar til Tóru Hentze (mammu Kjartan) við svari

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á, hví summi børn steðga við at vaksa?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit haldi at tað sum ger at nøkur børn steðga við at vaksa er:

1. Tí at teirra kroppur ger for lítið av onkrum evni.
2. Tí tað arbeiðið, sum kroppurin skal gera fyri at vit vaksa steðgar bara
3. Tí at tey mangla vitaminir
4. Tí at vøddarnir sovna
5. Tí at kroppurin heldur at tey eru nóg gomul, so tey stoppa við at vaksa
6. Tí tey sova ov lítið

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

1. Ringja til Jeaneth Løkja, sum er kommunulækni og spyrja nakrir spurningar ella um hon kann siga okkum hvønn lækna vit skulu seta okkum i samband við.

2. Gera samrøðu við foreldrini hjá Kjartani.

3. Gera samrøðu við Elsu Vest heilsufrøðing

4. Leita á alnótini

# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Vit hava ringt til Jeaneth Løkja sum er komunu lækni og spurdu hana nakrar spurnigar, um hví nøkur ung stoppa við at veksa. Hon segði seg ikki vita so nógv, um sovoriðið og so spurdu vit hana, um hon visti nakran vit kundu seta okkum í samband við. Hon gav okkum so telefon nummar og e-post adressu hjá barnadeildini á landssjúkrahúsiðnum. Síðani gjørdu nakrir spurningar og sendu tað til barnadeildina við e-posti. Sí fylgiskjal nr 1.

Landssjúkrahúsið
National Hospital of the Faroe Islands

Barnadeildin sendi okkara spurningar víðari til ein lækna. Rúna Olsen sum  er barnalækni svaraði uppá okkara spurningar. Hon fortaldi millum annað at tað er fleiri ymiskar orsøkir til at børn steðga við at vaksa. Sí fylgiskjal nr. 2.

Vit gjørdu síðani nakrir spurningar til Elsu Vest heilsufrøing. Hon kom á skúlan til eina samrøðu við okkum. Spurningarnir vóru gjørdir soleiðis at vit kundu fáa svar uppá hypotesurnar. Tað sum Elsa fortaldi okkum var at nógv ymiskt ávirkar, hvussu vit veksa. Fyri at fáa alt við sum Elsa segði valdu vit at taka samrøðuna upp á telefon. Aftaná skrivaðu vit tað niður sum hon segði. Sí fylgiskjal nr. 3



Og vit gjørdu eisini spurningar til Tóru mammu Kjartan, sum gongur í okkara flokki. Hann noyðist at sproyta seg hvønn dag, tí hann sum 5 ára gamal steðgaði við at vaksa. Hon kundi fortelja okkum hvat tað er sum ger at Kjartan ikki veksur eins og hini í flokkinum. Hon segði at Kjartan manglar eitt evni í kroppinum sum ger at hann ikki veksur. Eisini segði hon okkum at Kjartan skal sproytast hvønn dag við Norditropin sum ger at hann nú veksur. Sí fylgiskjal nr. 4



Á alnótini fóru vit á google. Lærarin hjálpti okkum at leita. Vit vitjaðu fleiri heima síðir, men hesar báðar góðu okkum svar uppá spurningar, so sum hvar í heilanum verður vakstarhormon gjørt og annað vit yvaðust í.

https://netdoktor.dk/ordbog/vaeksthormon.htm

https://min.medicin.dk/Sygdomme/Sygdom/93

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Tað sum vit er komin fram til er at nøkur børn steðga við at veksa tí at tey mangla vakstrarhormon í kroppinum. Vanliga ger kroppurin sjálvur hetta evni í heilanum, men hjá hesum børnum, sum mangla tað dugur heilin ikki at gera tað.

Vit hava tó funnið út av, at hesi børn kunnu fáa hjálp við at sproyta seg við einum evni, sum eitur Norditropin, sum er akkurát líka sum vakstrarhormon.

Vakstrarhormon blíva gjørd í hypofosuni tað er eitt líti stað á botninum í heilanum.

Tað eru  fleiri ymiskar grundir, men tvær høvðisorsøkir, sum  ávirka vøkrturin nógv, antin at kroppurin ikki fær teir byggisteinarnir hann skal brúka, ella at kroppurin ikki ger hesi evnini/hormon hann skal brúka fyri at gera at kroppurin veksur

T.d. er tað sera týdningarmikið at sova nóg nógv (uml. 11-12 tímar) og røra seg nóg nógv og eta góðan mat og at vit trívast samstundis.

Vakstrarhormonir stimulerast tá ið vit:

Meðan vit sova (serliga teir fyrstu tímarnar)

Tá vit eta mat við nógvum proteininum

Venjing. Til dømis íðka ítrótt

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Ætlanin er at gera eina framløgu á skúlanum tá vit hava morgunsang. Vit vilja gjarna fortelja hvussu vigtigt tað er at eta gott og sova 11-12 tímar um náttina. Vit halda eisini at tað er vigtigt at fáa tað út at hava viðring fyri teimum sum hava ein sjúku, sum ger at tey ikki veksa og ger at tey mugu taka heiluvág.

# FYLGISKJØL

## Fylgiskjal 1

## Spurningar til barnadeildina

Vit ganga í 5. flokki í Sands skúla. Vit granska og undrast yvir, hví onkur børn steðga við at vaksa? Í okkara flokki gongur ein næmingur, sum sproytar seg við vakstrarhormonum og av og á ferðast til Danmarkar í hesum ørindum. Vit ynskja at vita meir, um hví summi børn ikki vaksa ella halda uppat og hava sett nakrar spurningar saman úr okkara hypostesum.

Spurdómur:

**Hví eru tað nøkur børn, sum steðga við at vaksa?**

1. Er tað kroppurin, sum ger ov lítið av nøkrum evnum, sum ger at man ikki veksur?

2. Er tað, tí at tað, sum ger at vaksa verður uppi?

3. Er tað, tí at kroppurin manglar vitaminir?

4. Hevur svøvnur nakað at gera við, hvussu vit vaksa?

5. Er tað møguligt at vit kunnu hava øll neyðug evnir fyri at vaksa, men at kroppurin bara steðgar at gera arbeiðið sum skal til fyri at vit vaksa?

6. Hvussu finnur man út av at onkur er steðga/ur at vaksa?

7. Tá man hevur fingið at vita at man er steðgaða/ur at vaksa hvørja hjálp fær man?

Vh 5. flokkur í Sands skúla

# Fylgiskjal 2

**Hví eru tað nøkur børn, sum steðga við at vaksa?**

Tá børn steðga við at vaksa, kann tað antin vera tí tey ikki hava nokk av teimum evnum, sum skulu fáa kroppin at vaksa, ella tí teirra kroppur ikki upptekur nóg mikið av føðslu og vitaminum. T.d um tú steðgar at eta, so kanst tú heldur ikki vaksa. Eisini eru summi, sum hava onkra tarmsjúku sum ger, at at tey ikki kunnu upptaka nóg mikið av føðslu.

So tað kunnu vera nógvar ymiskar grundir, men í høvuðsheitum tveir bólkar, antin at kroppurin ikki fær teir byggisteinar, hann skal brúka, ella at kroppurin manglar tey evni/hormon, sum skulu siga kroppinum, at hann skal vaksa.

Tað er týdningarmikið við nóg mikið av svøvni í sambandi við vøkstur, tí størstu parturin av vakstrarhormininum verður gjørt um náttina.

Um øll neyðugu evnini eru til at vaksa, so ger kroppurin eisini tað arbeiðið sum skal til fyri at vaksa.

Mátin tú finnur útav, um onkur er steðgaður at vaksa, er at fylgja við hæddini. Tað eru regluligar kanningar hjá lækna og heilsusystir, og har verður fylgt við, um barnið veksur, sum tað skal. Um barnið so steðgar við at vaksa, verður tað kannað nærmari á barnadeildini. Um kanningin vísir, at barnið er steðgað at vaksa, tí tað manglar vakstrarhormon, so kann tað fáa sproytur við vakstrarhormoni regluliga, so kroppurin fær tað tilskot, hann ikki sjálvur klárar at gera.

Góða eydnu við uppgávuni

Vinarliga Rúna Olsen, barnalækni

# Fylgiskjal 3

## 1. Hví steðga nøkur børn at vaksa?

### Elsa Vest heilsufrøðingur:

Tað kann vera at tey sova for lítið

Og tað kann eisini brúka kroppin for lítið

Og Gera for litið av ítrotti

Tey røra seg for lítið

Tað kann vera at tað er eitt sum eitur vakstrarhormonir, sum ikki eru orduliga komnar rættliga.

Tað kann eisini vera at tey ikki trívast so væl heima ella í skúlanum so kann tað eisini ávirka vøkstrin.

## 2. Veit tú hvørja hjálp tey kunnu fáa?

Tey kunnu fáa hjálp við at práta við onkran vaksnan, og tey kunnu fáa hjálp hjá einum lækna, og tey kunnu eisini fáa hjálp við at práta við lærarin, og eisini við at tosa við foreldrini.

## 3. Veit tú um tað er nakað ringt sum kann henda um tey ikki fáa hjálp

Tey kunnu blíva eitt sindur kedd og tey kunnu eisini blíva argað av tí.

## 4. Hava tey  børn sum ikki vaksa brúk fyri meira svøvn enn onnur?

Tey hava brúk fyri minst 12 tímum av svøvni líka til tey er 11 ella 12 ár tí annars kann tað ávirka skúlagongdina og annað t.d tað sum eg havi nevnt.

# Fylgiskjal 4

## Spurningar til Tóru Hentze

**Nær funnu tey út av at Kjartan steðgaði at veksa?**

Tá í hann var fimm ár funnu tey út av tí at Kjartan var steðgaður at veksa. Hann fór ikki í viðgerð fyrrenn hann var 9 ár.

**Hvat gjørdu læknarnir tá í teir funnu út av tí?**

Hann bleiv innlagdur og fekk nakrar sproytur.

**Hvat er tað, sum ger at Kjartan ikki veksur?**

Kjartan veksur ikki, tí hann manglar eitt evni í kroppinum, sum verður gjørt í heilanum.

**Hvat er tað sum kjartan tekur?**

Í sproyduni er Norditropin.

**Hvussu leingi skal Kjartan sproyta seg?**

Til hann er 18 ár, um hann ikki blívur sína normalu hædd áðrenn.